UTTAN ÚR HEIMI

# Sjálvmorð helst orsøk til tokvanlukku

**Maðurin, sum setti bilin á jarnbreytina ímillum London og Plymmouth, gjørdi onga roynd at sleppa burtur, tá tokið kom**

TOKVANLUKKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Maðurin í hesum bilinum gjørdi onga roynd at sleppa burtur, tá snartokið úr London kom ímóti honum við 160 kilometra ferð*

*Mynd: Reuters*

Førarin á snartokinum ímillum London og Plymouth hevði ongan møguleika at steðga, tá tokið sunnukvøldið rendi á ein bil, sum stóð mitt á jarnbreytini. Umleið 300 fólk vóru í tokinum, og sjey teirra doyðu. Teirra millum var tokførarin. Umleið 60 onur máttu á sjúkrahús.

Men hví stóð bilurin á jarnbreytini? Bretska løgreglan vildi ikki svara spurninginum í gjár, men ein løgreglumaður, sum sá tilburðin, greiddi fjølmiðlunum frá, at maðurin í bilinum gjørdi onga roynd at sleppa burtur, tá tokið kom.

– Eg helt, at bilurin var á veg yvir um jarnbreytina, men brádliga steðgaði hann á sjálvari breytini. So fóru bummarnir niður, tí at eitt tok var á veg, men maðurin varð sitandi í bilinum, og lítla løtu seinni rendi tokið á bilin við 160 kilometra ferð, segði løgreglumað-urin.

Stoyturin var so harður, at fleiri tokvognar fóru av jarnbreytini.

Í Bretlandi hava fólk leingi kravt, at vegirnir við jarnbreytirnar verða broyttir, so fólk sleppa frá at koyra tvørtur um tær jarnbreytirnar, sum tey stóru snartokini brúka.

## Skonnart var illa hildin

Danska sjóferðslustýrið sigur í einari frágreiðing, at vantandi viðlíkahald var orsøkin til, at skonnartin "Martha" sakk í Kattegat um náttina tann 11. juli í ár. Vanlukkan kravdi tvey mannalív.

Sjóferðslustýrið sigur í frágreiðingini, at skonnartin lak, og at tað var høvuðsorsøkin til vanlukkuna. Skipið lak í fleiri støðum, tí tað var alt ov illa hildið. Men sambært sjóferðslustýrinum gjørdi manningin eisini fleiri mistøk, áðenn skipið sakk.

Felagsskapurin, summ eigur skonnartina, ásannar, at ov lítið varð gjørt við at halda skipið við líka.

## Vil hava japanar

Fyri fyrstu ferð skal guvernørurin í Kalifornia, Arnold Schwarzenegger, leiða eina sendinevnd. Hann skal standa á odda fyri einum liði av vinnulívsfólki, sum skulu til Japan.

Endamálið við ferðini er at fáa japanar at vísa Kalifornia størri áhuga. Nógvir japanar kenna Schwarzenegger frá filmunum, sum hann hevur spælt, og hesum ætlar guvernørurin at fáa meiri burturúr. Sum skilst ætlar Schwarzenegger at brúka seg sjálvan í gamla leiklutinum sum The Terminator í reklamum, sum skulu fáa japanar til Kalifornian at ferðast.

Japanskar vinnulívsfyritøkur hava gjørt stórar íløgur í Kalifornia, men guvernørurin heldur, at áhugin kundi verið uppaftur størri, og tí skulu hann og hini í ferðalagnum hitta fleiri japanskar vinnulívsmenn og politikarar á ferðini, skrivar AP.

## Skráseta skip í Bretlandi

Farstad Shipping, sum er størsta reiðaríið í norsku frálandavinnuni, hevur gjørt av at skráseta síni skip í Bretlandi, skrivar Aftenposten.

Frammanundan hava fleiri av teimum størstu norsku reiðaríunum tikið síni skip úr norsku skipaskrásetingini og skrásett tey í øðrum londum. Leiðslan í Farstad Shipping sigur, at felagið hevur ikki annað í at velja enn at skráseta skipini uttanlands, tí treytirnar har eru munandi lagaligari enn í Noregi.

Fyribils hevur felagið skrásett fimm skip í Bretlandi. Framman undan eru fleiri skip hjá reiðarínum skrásett í Singapore, og leiðslan hevur avgjørt, at í framtíðini verða allir nýbygningar skrásettir uttanlands.

Farstad Shipping hevur 49 skip, sum eru knýtt at frálandavinnu ymsastaðni kring heimin. Umleið 12 prosent av umsetninginum er í Noregi.

## Færri íløgur

Í Kina hava myndugleikarnir gjørt av at avmarka tær almennu íløgurnar til tess at forða fyri, at ov nógv ferð skal koma á búskapin.

Í einari røðu leygardagin segði varafíggjarmálaráðharin, Lou Jiwei, at tær almennu íløgurnar hava verið ov stórar. Sambært ráðharranum hevur Kina brúkt meiri enn 60 milliardir dollarar til samferðslukervið higartil í ár. Verða íløgurnar hjá almennum feløgum taldar við, eru almennu íløgurnar higartil í ár heili 26 prosent størri enn í sama tíðarskeiði í fjør, og tað er alt ov nógv, segði Lou Jiwai. Hann fegnaðist um tann góða búskaparvøksturin í Kina tey seinastu árini, men legði afturat, at myndugleikarnir eiga at ansa eftir, at vøksturin ikki verður ov stórur.

Sambært myndugleikunum í Beijing verður kinesiski útflutningurin 31 prosent størri í ár enn í fjør, men roknað verður við, at vøksturin næsta ár verður beint oman fyri 20 prosent. Men tann veksandi útflutningurin ger, at innflutningurin veksur eisini skjótt, og tí er tað ikki óhugsandi, at hall verður á handilsjavnanum næsta ár, skrivar tíðindastovan Bloomberg.

Tær stóru almennu íløgurnar hava eisini gjørt, at Kina hevur hall á fíggjarlógini.

# Kann vera størsti bardagin síðani Vietnam-kríggið

**Amerikanskir hervyirmenn siga, at bardagin um irakska býin Falluja kann gerast tann harðasti, sum amerikanskir hermenn hava verið í síðani bardagan um vietnamesiska býin Hue í 1968**

Irak
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í 1968 eydnaðist tað amerikanska herinum at taka býin Hue aftur frá Vietcong og norðurvietnamesiskum hermonnum. Men bardagin var harður og kostaði nógvum amerikonskum hermonnumm lívið.

Gjáramorgunin lupu amerikanskir og irakskir hermenn á irakska býin Falluja, har mótstøðumenn hava hildið til seinastu mánaðarnar. Umleið 20.000 hermenn eru við í álopinum, og amerikanararnir halda, at mótstøðumenninir eru umleið 5.000 í tali.

ST hevur ávarað USA og iraksku stjórnina ímóti at leypa á býin, tí vandi er fyri, at nógv sivilfólk fara at lata lív, men sambæt amerikonsku herleiðsluni eru tey flestu sivilfólkini flýdd úr býnum.

### Undantaksstøða

Sunnudagin kunngjørdi irakski forsætisráðharrin, Iyad Allawi, at stjórnin hevði gjørt av at lýsa alt landið við undantak av tí kurdiska økinum í undantaksstøðu. Hann segði avgerðina vera neyðuga, skal tað eydnast at skipa fyri vali í landinum í januar sum ætlað.

Norski serfrøðingurin Henrik Thune væntar ikki, at undantaksstøðan fer at gera enda á ófriðinum í Irak. Hann vísir á, at mótstøðan imóti hersetingarvaldinum og stjórnini í Bagdad hevur ongantíð verið so væl skipað sum nú. Samstundis er tað greitt, at mótstøðumenninir hava gjørt at gera seg inn á iraksku myndugleikarnar heldur enn amerikonsku hermenninar, sigur hann.

Um vikuskiftið lótu minst 21 irakskir løgreglumenn lív, tá mótstøðumenn lupu á eina løgreglustøð nærhendis býnum Ramadi, og í býnum Haqlaniya doyði ein løgregluovasti av einari bumbu.Stutt eftir brast ein bumba uttan fyri húsini hjá fíggjarmálaráðharranum, og í Bagdad doyðu tveir amerikanskir hermenn, tá ein bumba brast har. Nakað norðan fyri Bagdad fann løgreglan líkini av tveimum monnum, sum høvdu arbeitt fyri amerikanska herin.

– Í fjør bleiv sagt, at eingin hevði tamarhald á støðuni í Irak, tí minst 20 álop vóru hvønn einasta dag: Nú eru álopini umleið 80 um dagin, sigur Henrik Thune við Dagsavisen. Hann væntar ikki, at tað ber til at fáa eina politiska loysn í Irak, fyrr enn amerikanararnir boða frá, at teir eru sinnaðir at taka seg úr landinum.



VIÐMERKINGAR

# Kommunustýrisvalið á Sandi

**Eyðun Mohr Viderø**
*valevni á lista A*



VAL04

Uttan iva vilja øll síni heimbygd tað besta, og í hesum døgum bjóða valevni seg fram til komandi kommunustýrisval.

Á Sandi hava vit á lista A gjørt eina valskrá/arbeiðsætlan, ið ikki bert er eitt hugskot, men sum vit veruliga ynskja at fremja í verki!

Við tað, at ein bygd sum Sandur fíggjarliga er rættuliga nær tengd at vinnumøguleikunum á staðnum, so er eyðsæð, at sera umráðandi er, at umstøðurnar á havnaøkinum eru nøktandi, men her vænta bæði liðugtgerð av sjálvari nýggju havnini, og ábøtur á keiøkið uppi á landi, serliga við flakavirkið. Vinnan skapar inntøku, og ikki fyrr tað er í lagi, kunnu vit seta tiltøk í verk uppi á landi til frama fyri fólkið á staðnum!

Tá inntøkumøguleikarnir eru til staðar, kunnu vit gera onnur tiltøk til frama fyri borgararnar. Her verður, sum støðan er í løtuni, serliga hugsað um kloakviðurskiftini, um skúlaviðurskiftini hjá smærru børnunum, og um umhvørvið annars, við atlitið til okkara sermerktu vøkru náttúru so sum Sandsvatn v.m.

Síðani koma umstøðurnar til trivna hjá okkara uppvaksandi ættarliði, og tí verður neyðugt at útbyggja Sandoyar Meginskúla við eini ítróttarhøll.

Men ein fyritreyt fyri øllum ynskjunum er, at kommunustýrið førir ein neyvan og skinsaman fíggjarpolitikk, og tað er aðalmál okkara á lista A.

Fyri at náa hesum biðja vit um tykkara stuðul á valdegnum 9. nov.!

# Globaliseringin ein spennandi avbjóðing fyri Sambandsflokkin

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



VAL04

Tað eru mangir føroyingar sum eru ikki sørt ørkymlaðir av øllum hesum nýggja sum floymir inn yvir land okkara, bæði tá talan er um nýggja tøkni og um broytingar í okkara nærumhvørvi, sum við breiðbandi og elektroniskum pen-ingaflytingum eru vorðin ein stórur partur av heiminum.

Ein av nýggju avbjóðingunum er Evropa. Tað er upp til okkum sjálvi hvussu vit velja at síggja hesar avbjóðingar, og vit kunnu ikki venda teimum bakið. Fyri at skapa framhaldandi búskaparvøkstur og vælferð, so metir Sambandsflokkurin at vit skulu síggja hetta rákið sum eina spennandi avbjóðing, sum, um vit brúka hana rætt, verður grundarsteinurin undir einum framtíðar vælferðarsamfelagi.

Higartil hava føroyingar sett seg sjálvar uttanfyri Evropa, við tí úrsliti, at vit eru í ferð við at avreiða øll arbeiðspláss í fiskivinnuni til ES. Um vit bara tosa um hvørjar hóttanir tann nýggja tíðin ber við sær, so koma vit framhaldandi at standa eftir sum eitt fjarskotið tilafturskomið land.

Vit mugu ongantíð ov skjótt brynja okkum út til eina globala kapping í vinnulívinum, sum ongantíð fyrr hevur verði. Tað er ábyrgdin hjá teimum sum siga nei til samstarv, eisini at vísa á gongdar leiðir, hvussu vit kunnu skipa okkara samfelag uttanfyri Evropa.

Sambandsflokkurin metir at tann besti vegurin til framburð er at stimbra alla frælsa kapping í vinnulívinum, og at sleppa av við øll monopolir og duopolir sum tíanverri hótta kostnaðarstøði í øllum heimsins samfeløgum í dag.

Samstarv er vegurin fram.

# Tey forsømdu

**Jónas Johnsson**
*Valevni Sjálvstýrisfloksins*



VAL04

Vit skulu stuðla teimum, ið vilja vera um síni, tá støðan krevur tað. Góð heimarøkt er alneyðug. Men bert at fáa tann liggjandi upp at sita, eta, og so er liðugt, er alt ov lítið fyri fleiri. Tey stirvna óneyðugt. Og rørsluliga órøktin verður ein ónd rás, sum so aftur niðurpínir og krevur meira seinni! Hetta skal ikki lastast heilsuhjálparunum, sum gera eitt megnar arbeiði, men teirra tíð verður avsett við minuttum.

Mítt hjartamál er, at fyribyrgjandi-, røktandi- og afturvinnandi førleikahjálp verður verksett til tey óhjálpnu heima. Hesi ringast forsømdu, ið ikki klára nakað sjálv. Stovnur til uppvenjingar uttanfyri sjúkrahús, til tey frægari stillaðu, ynskist sjálvandi eisini. Hann eigur kommuna okkara at gera skjótast.

Tað skal verða eitt tilboð til øll, alt eftir teirra førleika, og áðrenn støðan versnar so nógv, at ikki vendist aftur. At hetta treingir til í ólukkumát, tað kenni eg til frá mínum arbeiði. Fysioterapeutisk- og onnur uppvenjing í heimunum er sera illa stødd sammett við grannatjóðirnar.

Hesum vil eg sjálvandi arbeiða fyri við lív og sál, men ávirkanin er lítil og ongin uttan fyri býráðið. Eru tað ikki onnur, ið eisini vilja styðja hesum? Sigið tað so við atkvøðuni tann 9.!

Ætlanin er at leggja eldraøkið út. Men tað er áðrenn eldraøkið er lagt út, at vit skulu tryggja, at broytingin gevur batar. Tey eldru fylla mest millum tey forsømdu. Landsstýrið skal áhaldandi minnast á at lógartryggja, at ongin frá tí minstu kommununi til Tórshavnar Kommunu, verður við sviðið soð.

Men bert at vóna, at alt skal verða betur, er ikki nokk. Tað er óvanliga góðtrúgvin persónur, sum velur sama persón og flokk aftur, sum í býráði próvfast ikki megnaði nakað fyri hettar nógv forsømda øki.

Vel tú heldur títt umboð úr Sjálvstýrisflokkinum. Vit vilja í verki hjálpa okkara forsømdu. Og síðani er tað so nógv annað gott, sum vit eisini vilja, men tað er ongin orsøk at yvirbjóða.

Gott val øll somul og setið tí krossin við D

# Nýggj kommuna - nýggir møguleikar

**Heðin Zachariasen**
*valevni*



VAL04

Eg bjóði meg fram at skipa og reka nýggju Sunda Kommunu og vil virka fyri:

- at peningurin hjá borgararunum verður væl umsitin
- at okkara kommuna altíð verður rikin væl fíggjarliga
- at okkara útbyggingar verða raðfestar inn í framtíðina
- at skapa bestu karmar fyri vinnuna í kommununi
- at grundstykkir verða tøk í øllum bygdunum í kommununi
- at ansingarpláss altíð eru til tey smáu
- at børnini fáa bestu skúlaumstøður
- at børn við breki fáa ta hjálp, ið er neyðug
- at skapa bestu karmar fyri ungdómin
- at umstøðurnar hjá teimum gomlu altíð verða tær bestu
- at alternativir íbúðarmøguleikar finnast í kommununi

Latið okkum í felag útbyggja og menna okkara kommunu. Vit hava nærum óteljandi møguleikar, og tað er sera umráðandi at vit byrja rætt.

Góði veljari! Eg vil vísa ábyrgd og álit!

Far tí á val og set X við Heðin Zachariasen á lista C.

Gott val!

# Far á val í dag

**Bjarti Mohr**
*býráðslimur,*
*Fólkaflokkurin*



VAL04

Góði borgari í Tórshavnar Kommunu.

Tað er ógvuliga umráðandi at tú fer á val í dag og verður við til at velja komandi Býráð í Føroya stórstu kommunu. Tað er nevnliga soleiðis at bert vit her í kommununi kunnu skapa okkara egna lívsgrundarlag. Eingin annar kemur og ger tað fyri okkum. Vit hava eitt gott og sterkt vinnulív sum skapar arbeiðspláss hvønn einasta dag. Vit hava ein góðan almennan sektor sum eisini skapar arbeiðspláss til fleiri fólk bæði innanfyri og uttanfyri kommununa. Vit hava góðar sosialar karmar fyri tey sum hava hjálp fyri neyðini. Ikki alt er loyst enn á hesum øki. Men við felagsarbeiði og áræði vil Tórshavnar Kommuna megna at loysa flestar av hesum uppgávum.

Hugsa um at 40% av Føroya fólki býr í Tórshavnar Kommunu. Hugsa um hvørjar møguleikar hetta gevur fyri virksemi, lívsinnihaldi og møguleikum fyri teg og børn tíni.

Lat Tórshavnar Kommunu vera miðdepilin og kraftsentrið í Føroyum.

Seti X við lista A - Fólkaflokkin